# Reglugerð fyri FM í badminton

## §1 Luttøkutreytir

**Stk. 1:** Bert leikarar ið eru føddir í Føroyum, hava føroyskt foreldur ella hava búð minnst 2 samanhangandi ár í Føroyum undan FM kappingini hava loyvi at luttaka.
Starvsnevndin/kappingarnevndin hevur – um serlig atlit eru galdandi - heimild at geva undantaksloyvir frá hesi regluni. Til hetta krevst ein samd nevnd (starvs- og kappingarnevnd).

**Stk. 2:** FM kappingin er kynsbýtt soleiðis at skilja, at gentur/kvinnur spæla fyri seg og dreingir/menn spæla fyri seg – tó undantikið blandaður tvímansleikur.

**Stk. 3:** Yngru deildirnar eru býttar upp í aldursbólkar, soleiðis at eldri leikarar ikki kunnu luttaka í yngru aldursbólkum. Yngri leikarar kunnu frítt velja at leika í eldri aldursbólkum – tó kann sami leikari bert luttaka í einum ungdómsaldurs-bólki. Aldursbólkarnir eru:

U 9: Leikarar sum ikki eru fyltir 9 ár áðrenn 1. januar í FM árinum

U11: Leikarar sum ikki eru fyltir 11 ár áðrenn 1. januar í FM árinum

U13: Leikarar sum ikki eru fyltir 13 ár áðrenn 1. januar í FM árinum

U15: Leikarar sum ikki eru fyltir 15 ár áðrenn 1. januar í FM árinum

U17: Leikarar sum ikki eru fyltir 17 ár áðrenn 1. januar í FM árinum

U19: Leikarar sum ikki eru fyltir 19 ár áðrenn 1. januar í FM árinum

**Stk. 4: A-bólkurin** er ætlaður teimu vaksnu spælarum, sum ikki luttaka í Meistarabólkinum ella Oldboys. (hetta er galdandi fyri hvønn *leik* einsæris, t.e einmasleik, tvímansleik og blandaðan tvímansleik).

Ungdomsleikari sum sama kappingarár vinnur sær rætt til luttøku í A-bólkurin (sambært §2 stk. 1) kann ikki eisini luttaka í Meistarabólkin í sama leiki.

**Stk 5: Meistarabólkurin** er bólkur uttan aldursmark, har bert leikarar, ið hava vunni sær rætt til luttøku, kunnu luttaka.
Rætt til luttøku hevur leikari sum luka eitt av hesum krøvum:

- spælari, sum hevur leikt FM í Meistarabólkinum árið fyri.

- í sama kappingarári hevur leikt i minst 2 umfør Vaksin-A bólkin í Grandprix.

- er millum 12* tey ovast plaserað menn / kvinnur í Grandprix fyri vaksin.

* talið av splælarum frá GP kann broytast av Kappingarnevdin, so í mesta lagi 24 luttakara er til kappingin í einmansleiki.

Kappingarnevndin kann geva undantaksloyvi (Wildcard) til spælara, sum t.d. vegna skaða, uppihald uttanlands og tílíkt, ikki hevur havt møguleika at lúka krøvini í §1 stk. 5.

Rætt til luttøku í Meistarabólkinum í einmannsleiki, gevur samstundis rætt til luttøku í tvímannsleiki og blandaður tvímannsleiki í Meistarabólkin.

**Stk. 6: Old-boys** er fyri leikarar sum eru fyltir 40 ár áðrenn 1. Januar í FM árinum.
Luttøka í Old-boys útilokar ikki luttøku í Meistarabólki sama ár – um annars leikarin hevur rætt til hetta.

## §2 Kvalifikatión til hægri bólk

**Stk. 1**: U13, U15 og U-17:
Vinnarin av Grandprix og nr. 1 og 2 í FM fyri einstaklingar sama árið, hava loyvi at luttaka í FM í A bólkinum hjá teimum vaksnu.

Nr. 1 og 2 í FM í tvímansleiki og blandaðum tvímansleiki hava loyvi at luttaka í A-bólkinum hjá teimum vaksnu í sama leiki.

**Stk. 2:**
Leikari í U13, U15, U17 og U19 sum hevur leikt í minsta lagi tvey umfør við teimum vaksnu í Grandprix sama kappingarár, hevur rætt til luttøku í Meistarabólkurin, um plasering á stigatalvan gevur teimun tann rætt (sambært § 1 stk 5). Annars í Vaksin-A.